*Hoyringsskriv galdandi til 26. februar 2023*

## Tónleikapolitikkur fyri Kringvarp Føroya

**Innihald:**

- Um tónleik í Kringvarpi Føroya
- Býtið av tónleiki
- Tónleikastýring
- Tónleikasendingar
- Tónleikaupptøkur og tónleikatiltøk

### Public service

Í public service-sáttmálanum, sum Kringvarpið hevur undirskrivað við Mentamálaráðið, stendur í stk. 5.2.8. um tónleik:

*"Kringvarp Føroya skal sum mentanarstovnur miðla tónleik og skapa áhuga fyri føroyskum tónleiki.*
*Føroyskur tónleikur hevur eitt týðandi pláss í Kringvarp Føroya.*

*Kringvarp Føroya skal geva rúmd fyri tónleiki innan allar tónleikagreinir. Kringvarp Føroya skal orða ein greiðan tónleikapolitikk, sum hevur fyrilit fyri býtinum millum føroyskan og útlendskan tónleik, ymsu tónleikagreinirnar, nýggjan og eldri tónleik o.s.fr.*

*Kringvarpið kann samstarva við aðrar mentanarstovnar og onnur við tí endamáli at skapa høvi hjá tónleikarum at framføra, og hjá føroyskum tónleikaverkum at verða framførd, serliga tá talan er um føroyskan sang og dans og føroysk kvæði, klassiskan tónleik, kórtónleik, populertónleik o.a."*

### Tónleikapolitikkur

Í høvuðsheitum snýr politikkurin seg um fýra ymisk øki í tónleiki. Hesi eru:

- Tónleikur í umferð (tónleikastýring)
- Tónleikasendingar (sjangrutónleikur)
- Upptøkur av livandi tónleiki (konsertir, frumframførslur, festivalar v.m.)
- Tónleikatiltøk (FMA, tónleikakappingar, spæl føroyskt dagar v.m.)

## Um tónleik í Kringvarpi Føroya

Í útvarpsmiðlinum er tónleikur ein týðandi partur av samlaðu sendiskránni. Bæði tá ið talan er um serstakar sendingar, har tónleikur er høvuðsevni, og sum partur av øðrum aktuellum og/ella beinleiðis sendingum, har onnur evni eru berandi (t.d. ítróttasendingar, ungdómssendingar, morgunsending o.s.fr.) Harafturat verður nógvur tónleikur spældur í Náttarrásini og rundan um sendingar í útvarpinum annars.

Í sjónvarpsmiðlinum eru føroyskar konsertir og føroysk videoløg ein regluligur partur av sendiskránni.

## Býtið av tónleiki

Útvarpsmiðilin skal spæla tónleik umboðandi allar tónleikagreinir.

Miðað verður tí eftir at hava nógvar og fjølbroyttar tónleikasendingar á skránni í gjøgnum árið. Hetta verður m.a. gjørt við at framleiða og miðla tónleikasendirøðir í avmarkaðum pørtum, sum hvør sær eru á skránni í eitt ávíst tíðarskeið. Á hendan hátt verður pláss fyri fleiri ymiskum tónleikagreinum á skránni í gjøgnum árið. Framleiðarin av einstøku sendirøðini má eisini gera sær púra greitt frammanundan, hvat viðkomandi vil við sínum sendingum. Hetta skal tryggja góðskustigið á einstøku sendingunum.

Føroyskur tónleikur hevur eitt týðandi pláss í útvarpsmiðlinum. Miðað verður eftir, at umleið helvtin av tónleikinum í útvarpinum er av føroyskum uppruna.

Tónleikurin skal endurspegla samtíðina, vit liva í. Miðað verður eftir, at umleið helvtin av tónleikinum, sum verður miðlaður, er nýggjur tónleikur.

## Tónleikastýring

Til tess at tryggja, at public service krøvini og tónleikapolitikkurin verða lokin í útvarpsmiðilinum, er neyðugt við neyvari tónleikastýring. Hendan uppgávan verður røkt av eini tónleikaredaktión, sum viðger og setir nýggjan tónleik í umferð hvørja viku undir leiðslu av tónleikasamskiparanum í KVF.

Tónleikaredaktiónin er mannað við starvsfólkum í KVF, sum fáast við og spæla nýggjan tónleik í sendingum. Redaktiónin arbeiðir eftir eini opnari og demokratiskari skipan, sum loyvir øllum áhugaðum at koma við uppskotum um, hvør tónleikur skal setast í umferð. Miðað verður eftir jøvnum kynsbýti í tónleikaredaktiónini.

Tónleikur í umferð verður serliga spældur í teimum breiðu sendingunum í útvarpinum, t.d. í morgunsendingini, í náttarrásini og rundan um sendingar í útvarpinum annars.

Tær sendingar, sum eru fevndar av tónleikastýring, skulu hava umboð í tónleikaredaktiónini, sum eiga at møta til vikuligu fundirnar.

Heitt verður á starvsfólk í KVF, tónleikarar, tónleikaáhugað og lurtarar um at senda uppskot inn til tónleikaráðið.

Fólk, sum gera sjangrusendingar, eiga at koma við tónleikauppskotum úr sínum sjangrum. Tónleikur úr øllum sjangrum kann skjótast upp fyri tónleikaredaktiónina.

Tónleikur í umferð verður mettur út frá hesum treytum:

- Føroyskur tónleikur hevur eitt týðandi pláss í útvarpsmiðlinum.
    - Føroysk løg verða raðfest hægri enn útlendsk. Miðað verður ímóti at seta minst eitt lag í umferð av øllum nýggjum føroyskum útgávum. Útgávur, ið haraftrat lúka aðrar treytir, kunnu hava fleiri løg í umferð yvir eitt longri tíðarskeið.
- Nýggjur tónleikur, sum endurspeglar samtíðina.
    - Meginreglan er, at í mesta lagi eitt ár skal vera liðið, síðani lagið varð givið út alment.
- Tónleikur, sum verður mettur at hava áhuga fyri lurtaran.
- Tónleikur, sum hóskar væl til sendingar hjá útvarpinum.
- Tónleikur, sum umframt áðurnevndu treytir umboðar fjølbroytni í sjangrum og uppruna.

Á heimasíðuni hjá KVF er nærri frágreiðing um, hvussu tú sendir nýggjan tónleik til KVF.

## Tónleikasendingar

Kringvarpið eigur at spæla allar tónleikasjangrur og at tryggja fjølbroytnið. Serlig fyrilit eiga at vísast fyri kvæðum og øðrum siðbundnum, føroyskum tónleiki.

Kringvarpið skal upplýsa føroyingar um, hvat hendir í føroyska tónleikaheiminum og á altjóða pallinum. Somuleiðis eigur Kringvarpið at vera við til at víðka sjónarringin hjá føroyingum við at seta ókendari sjangrur á skránna.

Samlaða útboðið av tónleikasendingum í KVF skal - umframt at vera afturlítandi - eisini umfata nýggjan tónleik.

Ein framhaldandi uppgáva hjá tónleikaredaktiónini er at menna útboðið av tónleikasendingum við nýggjum og ókendari tónleiki.

Harafturat skulu sendingar gerast, sum endurspegla tónleikalívið í føroyska samfelagnum.

KVF eigur at vera hugað at samskifta við áhugabólkar/persónar og at fáa hugskot/íblástur til nýggjar sjangrusendingar.

## Tónleikaupptøkur og tónleikatiltøk

Kringvarp Føroya skal leggja til rættis føroysk tónleikatiltøk, sum menna tónlistamentanina. Harafturat eigur KVF at gera upptøkur, sum endurspegla tónleikalívið í samfelagnum. Ein tónleikaredaktión undir leiðslu av tónleikasamskiparanum í KVF ger raðfestingar á økinum.

Høvuðsuppgávan hjá redaktiónini er at gera eina ársætlan fyri, hvørji tiltøk og hvørjar konsertupptøkur skulu sendast í útvarpi og sjónvarpi, og annars at fylgja við í tí, sum rørir seg í tónleikaøkinum.

Redaktiónin hevur fund tvær ferðir um árið - áðrenn vetrar og summarskráirnar byrja - og hittist annars eftir tørvi.

Spurningar, ið tónleikaredaktiónin skal taka støðu til, eru:

- Hvørji tiltøk eigur Kringvarpið at skipa fyri og hví? (T.d. tí eitt tiltak eggjar til framleiðslu, er slóðbrótandi, mennandi, savnandi, er gott innihald til sendingar, e.l.)
- Hvat er endamálið við upptøkunum? (Skapar t.d. áhuga, dokumenterandi, bjóðar av, gott undirhald, e.l.)

Tónleikaupptøkur, ið eru áhugaverdar fyri KVF, eru í hesi raðfylgju:

- Føroysk verk.
- Frumframførslur (oftast klassiskur tónleikur)
- Útgávukonsertir (oftast rytmiskur tónleikur)
- Føroya symfoniorkestur (t.d. nýggjárskonsertin)
- Framførslur í KVF í sambandi við sendingar (t.d. konsertrøðin “Í luftini”)
- Festivalar
- Framførslur úr ymsum sjangrum (áhugaverdar, sjáldsamar ella fólksligar)
- Aðrar framførslur

Tónleikatiltøk, ið eru áhugaverd fyri KVF at skipa fyri, eru m.a.:

- Spæl føroyskt vika
- Ársins útvarpshitt
- Heimligar tónleikakappingar og altjóða sangkappingar
- Tiltøk, ið eggja til sangskriving og framleiðslu av føroyskum tónleiki

*Hoyringsskriv galdandi til 26. februar 2023*

**<u>Skipan av tónleiki í KVF</u>**

**Mentannarleiðari -** Hevur evstu ábyrgd av tónleikaøkinum í KVF

**Tónleikasamskipari -** Samskipar tónleikaøkið undir leiðslu av mentannarleiðaranum

**Tónleikaredaktión 1 - "Rotatións-redaktiónin"**

Viðger og setur tónleik í umferð í útvarpinum. Redaktiónina mannað tónleikasamskiparin saman við 3-4 programfólkum.

Redaksjónin hevur regluligan fund hvørja viku.

**Tónleikaredaktión 2 - "Konsert-redaktiónin"**

Live tiltøk og konsertupptøkur. Redaktiónin ger ársætlan og raðfestingar á økinum, Redaktiónina mannað programfólk og sjónvarpsframleiðari saman við tónleikasamskipara og mentannarleiðara.

Fund tvær ferðir um árið - áðrenn vetrar og summarskrá - og annars eftir tørvi.

**Tónleikaredaktión 3 - "Sjangru-redaktiónin"**

Ger ársætlan og raðfestingar fyri tónleikasendingar í KVF. Redaktiónina mannað 3 programfólk saman við tónleikasamskipara og mentannarleiðara.

Fund tvær ferðir um árið - áðrenn vetrar og summarskrá - og annars eftir tørvi.

**Tónleikaráðið**

Tónleikaráðið hevur ein ráðgevandi leiklut við atliti at yvirskipaða programvirksemi Kringvarpsins á tónleikaøkinum.

Tónleikaráðið er samansett av redaktión 2 og 3 umframt tveir uttanveltaðir limir valdir av Tónleikasambandi Føroya.

Tónleikaráðið hevur ein árligan fund, har ætlanirnar á tónleikaøkinum fyri komandi árið verða viðgjørdar.